## Budam á G!Festivalin

Bólkurin hjá Búa Dam, Budam hevur um vikuskiftið gjørt vart við seg á SPOT-Festivalinum í Århus. Umframt at luttaka á almennu SPOT-skránni var bólkurin á tveimum tiltøkum, ið G!Festivalurin fyriskipaði fyrst í Keypmannahavn hóskvøldið og síðan í Århus fríggjakvøldið, í hesum sambandi varð kunngjørt, at Budam er á skránni fyri G!Festivalin í ár. Budam spælir søgur, og hesar hava m.a. verið lýstar sum at hoyra sjónleik, ella at hoyra porno. Budam gevur í næstu fyrst fløgu sína út við heitinum Stories of Devils, Angels, Murderers and Lovers á plátufelagnum TUTL.



## MjúS heldur steðg í ár

Hugnaligi festivalurin á Sandi, MjúS, verður ikki hildin í ár. Fyrireikararnir boðaðu í gjár frá, at tey undir fyrireikingunum til hetta summarið ikki kendu seg sannførd um, at tey fáa givið MjúS-gestum eina eins góða uppliving sum undanfarnu árini, tí hava tey valt at steðga á í eitt ár, og síðani byggja upp til at koma sterkt aftur komandi ár." Váta veðrið í fjør eigur part av orsøkini, hetta skerdi inntøkurnar so nógv, at trupult hevur verið at fáa gongd á í ár verður sag. Steðgurin gevur møguleika fyri, at fyrireika seg væl og virðiliga til MjúS í 2008.

# Føroyakvøld í Pushe



*Tað er ikki loyvt at taka myndir í Pusherstreet, men ein djarvur myndamaður tók eina, áðrenn hann fekk boð um at pakka myndatólið saman.*

**Leygarkvøldið gjørdu føroyingar innrás á Christiania, yvir 300 føroyingar komu saman í frístaðnum í Keypmannahavn har føroyskur dansur, føroyskur tónleikur og ein íslendskur trubadurur vóru á skránni**

KONSERT

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Christiania er eitt óvanliga hugnaligt stað, ein frístaður mitt í Keypmannahavn har pláss er fyri teimum, ið ikki passa inn aðrastaðni, eitt stað har fólk ansar eftir hvør øðrum og hjálpist at. Tú kennir teg altíð væl móttiknan, tá tú kemur inn í frístaðin, og so var eisini fríggjakvøldið, tá vit komu yvir um brúnna um Voldina og inn gjøgnum "bakdyrnar" hjá Christiania. Eitt vakurt summarkvøld, vit hoyrdu tutl innan úr teimum smáu og hugnaligu húsunum, og langt burturi gjørdist ljóðið av tekno trummum spakuliga týðiligari.

### Dansur í summarnáttini

Við hugnaliga og stuttliga spæliplássið, ið, áðrenn alt politirokið seinastu árini, var eitt væl vitjað mál fyri barnafamiljurnar á eitt nú Oyrasundskollegiinum, sótu tveir føroyingar og ballaðu sær eina sigarett. Vit heilsaðu uppá og gingu víðari. Vit komu framvið keldunni til teknoljóðið eini veitslu uttan fyri Månefiskeren, har nøkur hundrað fólk dansaðu og hugnaðu sær. Lukturin av hasji blandist við luktin av donskum summarið.

Á sjálvari Pusherstreet, har hasjhandilin plagdi at halda til í sølubúðum, var fest í eitt stórt bál, og ungfólk sótu rundan um tað og prátaðu. Ein friðsæla hvíldi yvir fólki. Klokkan var farin av 23.30, tá føroyski dansurin skuldi vera, so vit fóru inn í Operaen. Á veg upp gjøgnum trappurnar, møttu vit einum riðili av føroyingum. Fyriskiparin Edmund Sofus Jacobsen fremstur og honum á baki fólk frá dansifelagnum Fótatraðk og aðrir føroyingar.

- Kom vit fara at dansa við bálið, segði Edmund og skundaði sær framvið okkum. Tá vit komu oman aftur á gøtuna, var ringurin longu við at vaksa og fyrsta ørindið av Orminum Langa rungaði í Pusherstreet. Tilsamans mundu eini hálvthundrað føroyingar fara upp á gólv.

### Ongar myndir takk

Við bálið sótu fólk still og lurtaðu, einki hóvasták, bara eygleiddu og nikkaðu við til stevið, einasta ferðin onkur reistist, var tá ein tók mynd av dansinum.

- Der må ikke fotograferes her, segði ein ungur maður við myndamannin og myndatólið varð pakkað burtur. Tá seinasta ørindið var kvøðið, klappaði bálfólkið og vit leitaðu inn í litføgru hølini í Operaini. Alsamt fyltust hølini, og tá Týr eina løtu seinni fór á pallin rann sveittin av pannini hjá barrvørunum, og fatølannleggi byrjaði at bukka undir fyri trýstinum av fleiri hundrað tystum føroyingum.



*Christiania 10: Eini 350 fólk vóru savnaði í Operaen*

*Mynd: Edmund Sofus Jacobsen*

Ljóðið var so sum so, men Týr spældu við nógvari orku, og fólk hugnaði sær. Hesin bólkur hevur eina serliga støðu millum føroyingar, og kvæðarokkurin tykist at raka nógvar føroyingar beint í hjarta. Hesa løtuna kókaði frammanfyri pallin. Hóast ljósannleggið í Operaen ivaleyst er eldri enn Christiania og minnið enn flestu ljósannlegg, ið verða nýtt nú á døgum. So var ljósið hjá Týr óvanliga flott. Hetta komst av, at ljósmaðurin hjá Operaini ikki var komin hetta kvøldið, og Føroya nógv besti ljósmaður Egil B. Hansen, ið var komin á konsert, setti seg við knøttarnar. Tað var ótrúligt at síggja, hvussu nógv hann megnaði at fáa burturúr so lítlum. Eftir Týr tók onkur annar yvir við ljósknøttarnar, og hetta sást tíanverri.

### Løgin skrá

Íslendski trubadurin Petur Bén var næstur á pall. Hann var júst afturkomin av SPOT-Festivalinum, har hann spældi í einum sjónleikarhúsi og fekk ikki færri enn seks av seks møguligum stjørnum frá ummælaranum í Gaffa. Hann er ein framúrskarandi sangari, ein feitur gittarleikari og hevur sítt heilt egna ljóð, men hóskar seg ivaleyst betur í einum sjónleikarahúsið enn í eini barr við fullum føroyingum. Leygarkvøldið hevði hann trupult við at fylla pallin eftir, at ein føroyskur tungmálmsbólkur hevði buldrað. Tað tyktist, stutt sagt, burturvið at leggja skránna soleiðis. Men Petur Bén vísti greitt hvussu feitur hann er, hetta hóast ikki nógv fólk lurtaði. Heldur ikki Boys In A Band fingu sama lív í, sum Týr hevði fingið. Men vístu eisini hví teir eru Føroya besti nýggi bólkur. Sum heild var kvøldið stak hugnaligt. Nógv fólk var komið saman, og tey hugnaðu sær. Skráin kundi verið uppbygd annarleiðis, t.d. við at tey bæði progressivu og kanska ikki líka fólkakæru nøvnini millum føroyingar, Petur Bén og Boys In A Band kundu verið